# Maria og Jósef koma til Betlehem



**Frásøgufólk**

Einaferð var tað ein keisari, sum æt Augustus. Hann átti næstan allan heimin. Hann vildi vita, hvussu nógv fólk búðu í ríki sínum, so hann bað fólkini fara til bygdina, har sum tey vóru fødd at verða tald.

Maria og Jósef fóru til heimbygdina, Betlehem. Maria, sum skjótt skuldi eiga eitt barn, sat á asnanum troytt og køld. Tá ið tey komu til Betlehem seint um kvøldið, fóru tey at leita eftir innivist.

Maria og Jósef koma inn, Maria situr á asnanum. Tey fara til 1. húsaeigaran og banka á dyrnar.

1. húsaeigari: Góðan dag! Hvørjum kann eg hjálpa tykkum við?

Jósef: Vit eru bæði móð og køld. Hava tit pláss fyri okkum at sova í nátt?

1. húsaeigari: Nei, her er fult, vit hava onga tóma song.

Maria og Jósef fara til 2. húsaeigaran og banka á dyrnar.

2. húsaeigari: Góðan dag! Hvat vilja tit her so seint?